LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Tórshavnar Kommuna
Postbox 32 Vaglið
110 Tórshavn

Tórshavn: 10. novembur 2023
J. nr.: 23/02959-11
Viðgjørt: CHD

**Viðvíkjandi asfaltverkinum á Sundi**
Kommunala eftirlitið í Løgmálaráðnum fekk 30. januar 2023 klagu frá Áhugafelagnum við Kaldbaksfjørð um m.a. ólógligt byggivirksemi á asfaltverkinum á Sundi.

**Niðurstøða**
Kommunala eftirlitið metir, at Tórshavnar kommuna átti at havt biðið Landsverk um at senda skrivliga umsókn um byggiloyvi sambært § 9, stk. 1 og 2 í byggilógini í sambandi við umvæling av asfaltverkinum á Sundi og átti ikki at havt viðgjørt byggimálið á einum kunnandi fundi.

Byggimálsviðgerðin hjá Tórshavnar kommuna hevur viðført, at brot er framt á § 9, stk. 1 og 2 í byggilógini.

**Lógargrundarlag**
- Byggilógin (løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022)
- Bygningskunngerðin (kunngerð um bygningskunngerð 2017 (BK 17) nr. 72 frá 27. juni 2016)

**Um málið**
Áhugafelagið við Kaldbaksfjørð *(hereftir Áhugafelagið)* meldaði tann 28. novembur 2022 Landsverk og Tórshavnar kommunu til Føroya Politi fyri ávikavist ólógligt byggivirksemi á asfaltverkinum á Sundi *(hereftir asfaltverkið)* og fyri ikki at hava hildið sína lógarbundnu eftirlitsskyldu í sambandi við byggivirksemið.

Føroya Politi metti, at málið, í fyrstu syftu, ikki var eitt mál fyri seg og sendi tí málið víðari til Føroya Kærustovn, sum er kærumyndugleiki í byggimálum. Málið varð eisini sent Kommunala eftirlitinum, tí talan var um eina klagu um Tórshavnar kommunu.

Áhugafelagið setti seg í samband við Kommunala eftirlitið og greiddi frá málinum, og sendi harumframt Kommunala eftirlitinum skjøl, sum Áhugafelagið hevði fingið innlit í frá Tórshavnar kommunu. Sambært Áhugafelagnum hevði Landsverk ikki byggiloyvi til umvælingarnar, sum Áhugafelagið metti kravdu eitt skrivligt byggiloyvi. Áhugafelagið greiddi frá, at umvælingarnar

m.a. fevndu um útskifting av bitumentangum, uppseting av lyftu til heitan stein, silo´ir til rávøru, gongubrúgvum, eftirlitisútgerð, blandirúm, høll til sand o.s.fr.

Við grundarlagi í upplýsingunum frá Áhugafelagnum avgjørdi Kommunala eftirlitið at taka tann partin av málinum upp, sum snúgvi seg um byggimálsviðgerðina Tórshavnar kommunu í hesum máli.

**Málsgongd**

Tann 24. mars 2023 sendi Kommunala eftirlitið soljóðandi teldupost til Tórshavnar kommunu:

> "Løgmálaráðið skal biðja kommununa um at senda avrit av byggiloyvi og umhvørvisgóðkenning viðv. tí bygging/umvæling, sum er framd av asfaltvekinum á Sundi síðan 2019. Harumframt verður kommunan biðin um at senda avrit av gerðabókum frá býráðsfundum og nevndarfundum, har málið viðv. bygging/umvæling av Asfaltverkinum á Sundi síðan 2019 er viðgjørt. Biðið verður um upplýsingarnar við freist tann 14. apríl 2023."

Tann 14. apríl 2023 sendi Tórshavnar kommuna Kommunala eftirlitinum umbidnu skjøl í málinum og soljóðandi frágreiðing:

> "...
>
> Viðvíkjandi asfaltverkinum á Sundi, so er ikki talan um nýbygging, men umvæling/dagføring og uppstigan av verandi verki.
> Landsverk vendi sær til kommununa við einum fyrispurningi viðv. umvæling av Asfaltverkinum.
>
> Út frá teimum upplýsingum sum fyrilógu, metti kommunali byggimyndugleikin, at tað ikki var neyðugt við einum nýggjum byggiloyvi.
>
> Hendan avgerð varð grundað á, at verandi asfaltverk hevði byggiloyvi og umhvørvisgóðkenning.
>
> ...
>
> Sambært byggilógina § 10 stk. 1 og í Bygningskunngerðini er ásett, at ikki kann farast undir at byggja, fyrr enn skrivligt byggiloyvi er fingið til vega frá kommunala byggimyndugleikanum.
>
> Tó eru nakrar nýtsluavmarkingar í Bygningskunngerðini, m.a.:
>
> Í kap. 1.2 er ásett, at:
> Bygningskunngerðin er ikki galdandi fyri brýr, tunlar og onnur verkløg til ferðslulig endamál, sum ikki eru bygningar, og sum verða framd ella góðkend av vega- ella øðrum myndugleikum ella feløgum, sum við lóg hava ábyrgd av byggiarbeiðinum.

Og í kap.1.3, stk.1 (viðmerkingar) er ásett, at:
Kommunali byggimyndugleikin kann gera reglur fyri smærri byggingar, soleiðis at hesar ikki krevja byggiloyvi, um bygt verður eftir reglunum. Talan er um antennur, smærri vindmyllur, skeltir, sólskjól, terassur, lívdarskjól og tílíka smærri bygging.

Somuleiðis ger kommunali byggimyndugleikin reglur fyri, nær umbygging, afturatbygging og umvæling krevur byggiloyvi.

Tað vil siga, at tað er ikki í øllum førum at bygging krevur byggiloyvi og kommunan kann gera reglur og taka avgerð um, nær ein umvæling krevur byggiloyvi.

Í hesum føri metti Kommunan, at tað ikki var neyðugt við nýggjum byggiloyvi, bæði út frá Bygningskunngerðini og tí at virkið hevði umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni, sum er myndugleikin á økinum.

Harafturat hevur Asfaltverkið nýtsluloyvi frá Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum.

Hetta kann møguliga samanberast við eitt flakavirki, har kommunan viðgerð bygningin og har Arbeiðs- og Brunaeftirlitið tryggjar, at umstøðurnar kring maskinurnar eru í lagið.

Vísast kann í hesum sambandi til, at byggilógin er ein lóg, sum í stóran mun hevur ásetingar um at byggja bygningar (sama er galdandi fyri BK17). Í hesum føri er talan um eitt asfaltverk.

Byggiharrin fekk tó boð frá kommununi, at bygningar, sum hoyra til asfaltverkið krevja nýtt byggiloyvi, og tað hava teir fingið, meðan tað ikki var neyðugt við nýggjum loyvi til at umvæla sjálvt asfaltverki, treytað av, at umhvørvisgóðkenning er.

..."

Tann 1. mai 2023 bað Kommunala eftirlitið Tórshavnar kommunu um at senda sær fleiri upplýsingar um málið. Tann 8. mai 2023 svaraði Tórshavnar kommuna umbønini frá Kommunala eftirlitinum soleiðis:

"Kommunala eftirlitið: "Tórshavnar kommuna verður biðin um at senda avrit av móttøkuni av fyrispurninginum, t.d. avrit av telduposti, telefonnotati ella skrivligari umsókn um bygging. Harumframt eina dagfesting av nær Landsverk setti seg í samband við kommununa, hesum viðvíkjandi."

Tórshavnar kommuna: "Alt byrjaði við einum fundi. Sí fundarfrásøgnina frá 19.12.2019. (viðheft)"

Kommunala eftirlitið: "Tórshavnar kommuna verður biðin um at senda avrit av niðurstøðuni hjá kommunala byggimyndugleikanum, um at tað ikki var neyðugt við einum nýggjum byggiloyvi."

> Tórshavnar kommuna: "Sí fundarfrásøgn frá 19.12.2019. (viðheft)"
>
> ...
>
> Kommunala eftirlitið: "Tórshavnar kommuna verður biðin um at greiða frá, um kommunan hevur slíkar reglur *(reglur fyri smærri byggingar, mín viðmerking)*, og um so er, at senda avrit av teimum ella vísa til, hvar á heimasíðuni hjá kommununi hesar reglur kunnu lesast."
>
> Tórshavnar kommuna: "Kommunan hevur gjørt reglur fyri smærri byggingar sum ikki krevja byggiloyvi og eru hesar at síggja á heimasíðuni: torshavn.fo undir "bygging" og "bygging sum ikki krevur byggiloyvi".
>
> Kommunala eftirlitið: "Tórshavnar kommuna verður biðin um at greiða frá, um kommunan hevur slíkar reglur *(reglur fyri nær m.a. umvæling krevur byggiloyvi)*, og um so er, at senda avrit av teimum ella vísa til, hvar á heimasíðuni hjá kommununi hesar reglur kunnu lesast."
>
> Tórshavnar kommuna: "Kommunan hevur gjørt reglur fyri smærri byggingar sum ikki krevja byggiloyvi og eru hesar at síggja á heimasíðuni: torshavn.fo undir "bygging" og "bygging sum ikki krevur byggiloyvi". Tá kommunan vísir á Bygningskunngerðina í kap. 1.3, stk.1 (viðmerkingar), so er tað fyri at vísa á, at tað eru byggingar, ið ikki krevja byggiloyvi. Tá so talan er um umvæling av verandi bygging, sum hevur byggiloyvi, so má kommunan eisini her kunna gera eina meting av, um tað umvælingararbeiði, sum verður gjørt, krevur nýtt byggiloyvi.
>
> ..."

**Viðmerkingar hjá Løgmálaráðnum**
Í frágreiðingini frá Tórshavnar kommunu til Kommunala eftirlitið skrivar kommunan, at kommunali byggimyndugleikin ikki metti tað vera neyðugt við nýggjum byggiloyvi, tí talan ikki var um nýbygging, men umvæling/dagføring og uppstigan av verandi asfaltverkið. Viðmerkt varð, at verandi asfaltverk hevði eitt byggiloyvi frá 2004 og eina umhvørvisgóðkenning frá 2005.

Byggilógin § 2, stk. 1 ásetur:

> "Bygging í § 1 fevnir um nýbygging, umvæling, umbygging, afturatbygging umframt broyting í nýtslu av bygningum."

Sostatt er umvæling av bygningi eisini fevnd av lógini. Við umvæling er at skilja ábøtur á verandi bygning, sum kann fevna um eitt nú at skifta vindeygu ella tekju, tó uttan at bygningurin av hesum broytir skap ella útsjónd.

Byggilógin § 2, stk. 2 ásetur:

> "Bygningar sambært stk. 1 eru umframt bústaðarbygningar eisini aðrir bygningar, sum verða nýttir til vinnuendamál, fyrisiting, at hýsa tænastum til almenningin ella til frítíðarítriv og tílíkt."

Í lógarviðmerkingunum til § 2, stk. 1 og 2 stendur m.a.:

> " Hugtakið bygging fevnir ikki bara um bygningar í vanabundnari merking, so sum sethús, tvíhús, raðhús, hallir, kirkjur, farstøðir o.tíl., men eisini um múrar og aðrar fastar konstruksjónir, óansæð um bygt er innangarðs ella uttangarðs ella í økjum, sum í góðkendari byggisamtykt er løgd út til bygging ella ikki.
>
> ...
>
> Í hvussu stóran mun byggireglurnar kunnu gerast galdandi í tí einstaka førinum, skal byggimyndugleikin meta um og staðfesta, tá umsóknir um byggiloyvi verða viðgjørdar."

Hvørt eitt ávíst ítøkiligt verklag, sum eitt nú asfaltverkið, er ein bygningur sambært byggilógini, má kommunali byggimyndugleikin meta um í ítøkiliga førinum. Fyri at kunna gera hesa meting, krevst sambært lógarviðmerkingunum til § 2, stk. 2 í byggilógini, at byggimyndugleikin hevur fingið umsókn um byggiloyvi til viðgerðar sambært § 9, stk. 1 í byggilógini, sum ásetur, at umsókn um loyvi at byggja skal sendast til kommunala byggimyndugleikan. Ásett er í § 9, stk. 2 í byggilógini, at umsóknin skal vera skrivlig, hjálagt allar viðkomandi upplýsingar um bygningina, m.a. eyðmerking av bygningi og upplýsingar um, hvat bygningurin verður ella fer at verða nýttur til.

Kommunala eftirlitið metir, at Tórshavnar kommunu ikki hevði heimild til at viðgera ítøkiliga málið um byggiloyvi á einum fundi, tí sambært ásetingini í § 9, stk. 1 í byggilógini skal eitt byggimál takast upp við skrivligari umsókn. Kommunala eftirlitið metir tí, at Tórshavnar kommuna ikki hevði heimild til at gera ítøkiligu avtaluna við Landsverk, um einans at kunna um ætlanina, við at Landsverk sendi fram tekningar og eina lýsing av tí, ið skuldi verða skift út.

Tórshavnar kommuna skrivar í frágreiðing síni, tann 14. apríl 2023, at sambært byggilógini § 10, stk. 1 og í bygingskunngerðini er ásett, at tað ikki kann farast undir at byggja, fyrr enn skrivligt byggiloyvi er fingið til vega frá kommunala byggimyndugleikanum, men at nakrar nýtsluavmarkingar eru og vísir til kapitul 1.2. og vegleiðing til kapitul 1.3., stk. 1 í bygningskunngerðini.

Kommunala eftirlitið skal vísa á, at tað einans er punkt 1.2. í bygningskunngerðini, ið er ein nýtsluavmarking. Henda nýtsluavmarking er í mun til § 2, stk. 5 í byggilógini. Vegleiðingin til punkt 1.3., stk. 1 í bygningskunngerðini er ikki ein nýtsluavmarking, heldur ikki í mun til § 10, stk. 1 í byggilógini.

Í samband við, at Tórshavnar kommuna í síni frágreiðing til Kommunala eftirlitið vísti til vegleiðing í punkt 1.3., stk. 1 í bygningskunngerðini, bað Kommunala eftirlitið Tórshavnar kommunu um at greiða sær frá, um kommunan hevði reglur fyri nær umbygging, afturatbygging og umvæling kravdi byggiloyvi. Tórshavnar kommuna svaraði:

> "Tá kommunan vísir á Bygningskunngerðina í kap. 1.3., stk. 1 (viðmerkingar), so er tað fyri at vísa á, at tað eru byggingar, ið ikki krevja byggiloyvi. Tá so talan er um umvæling av verandi bygging, sum hevur byggiloyvi, so má kommunan eisini her kunna gera eina meting av, um tað umvælingararbeiðið, sum verður gjørt, krevur nýtt byggiloyvi."

Kommunala eftirlitið skal viðmerkja, at Kommunala eftirlitið ikki metir heimild vera í byggilógini § 10, stk. 1 til, at kommunali byggimyndugleikin kann gera reglur fyri, nær umbygging, afturatbygging og umvæling krevja byggiloyvi. Kommunala eftirlitið metir heldur ikki, at kommunali byggimyndugleikin hevur heimild, at meta um, hvørt eitt umvælingararbeiðið krevur skrivliga umsókn ella ikki. Byggilógin ásetur greitt í § 9, stk. 1 og 2, sbr. § 2, stk. 1, at umvæling krevur, at søkt verður við skrivligari umsókn um byggiloyvi.

Kravið um, at ikki kann farast undir at byggja uttan skrivligt loyvi frá kommunala byggiyndugleikanum, er eisini ásett í bygningskunngerðini undir punkti 1.3., stk. 1 í vinstra teigi (áseting). Í viðmerkingunum til punkt 1.3., stk. 1 í høgra teigi (vegleiðing) stendur:

> "Kommunali byggimyndugleikin kann gera reglur fyri smærri byggingar, soleiðis at hesar ikki krevja byggiloyvi, um bygt verður eftir reglunum. Talan er um antennur, smærri vindmyllur, skeltir, sólskjól, terassur, lívdarskjól og tílíka smærri bygging.
>
> Somuleiðis ger kommunali byggimyndugleikin reglur fyri, nær umbygging, afturatbygging og umvæling krevur byggiloyvi."

Kommunala eftirlitið metir, at vegleiðingin í høgra teigi í punkti 1.3., stk. 1 víðkar ásetingarnar í bygningskunngerðini og byggilógini, tí soleiðis sum vegleiðingin er orða, so kann kommunali byggimyndugleikin gera reglur fyri smærri byggingar, sum ikki krevja byggiloyvi. Slíkar reglur víkja frá lógarásetta kravinum um, at bygging ikki kann fara í gongd uttan skrivligt byggiloyvi frá kommunala byggimyndugleikanum, sbr. § 10, stk. 1 í byggilógini. Sambært vanligum aðalreglum um lógarsmíð kann ein slík vegleiðingin ikki víðka eina áseting í lóg ella kunngerð.

Kommunala eftirlitið fer at venda sær til Umhvørvismálaráðið, sum umsitur byggilógina og bygningskunngerðina, viðvíkjandi hesum.

**Niðurstøða**
Kommunala eftirlitið metir, at Tórshavnar kommuna átti at havt biðið Landsverk um at senda skrivliga umsókn um byggiloyvi sambært § 9, stk. 1 og 2 í byggilógini í sambandi við umvæling av asfaltverkinum á Sundi og átti ikki at havt viðgjørt byggimálið á einum kunnandi fundi.

Byggimálsviðgerðin hjá Tórshavnar kommuna hevur viðført, at brot er framt á § 9, stk. 1 og 2 í byggilógini.

Løgmálaráðið, 10. novembur 2023

Christina Holm Davidsen
*Fulltrúi*